


*Derek Brockie, frá D.B. Bilum, sýnir her ein Kia Carens CRDi. Bilurin er útgjørdur við t.d. hita í setrunum, el-síðurútum, el-síðuspeglum við hita, tokulyktum framman, aircondition, CD anleggi, leðurratti og leður girknøtti*

# Kia Carens sum persón- og vørubilur

**Kia Motors er elsta bilverksmiðja í Korea. Teir útflyta árliga yvir 600.000 túsund bilar til 160 lond í heimunum. Herfyri kom Kia Carens higar til landið. Carens er ein mini-MVP, sum fæst í útgávum við 5 ella 6 sitiplássum og sum vørubilur**

BILAR
*Magnus Gunnarson*

Hóast Kia Carens ikki er ein heilt nýggjur bilur, er hann fyrst nú komin á marknaðin her hjá okkum. Bilurin er ein rúmligur mini-MPV, sum fæst við fimm ella seks sitiplássum og sum vørubilur. Til fimm persónar eru sitiplássini sum vanligt, tvey framman og trý aftan, men tá bilurin er til seks persónar, eru setrini deild soleiðis: 2+2+2. Sum vørubilur er Carens praktiskur og arbeiðsvinarligur, lúkan aftan fer langt upp og lessihæddin er lág, og bilurin ber vektina væl. Koyrieginleikarnir eru sum á einum evropeiskum bili í somu støðd. Carens fæst við 1,8 litur bensinmotori við 126 hk og við 2.0 litur CRDi dieselmotori við 112 hk. Hesin common-rail dieselmotorurin koyrir gott og larmar lítið.

Sum vanligt á koreanskum bilum er næstan alt standard sum t.d.el-síðurútar aftan og framman, fjarstýrt sentrallás, el-síðuspegl við hita og hitatráðir í viskarunum. Bilurin hevur airbag framman og í síðunum, ABS bremsuskipan við EBD. Carens hevur nýliga fingið eina "facelift" og er hann sera snøggur innan, instrumentborðið er nýtt og smart. Alu-look panelir eru á instrumentborðinum og í hurðunum. Nógv pláss er til at leggja lutir frá sær á. Sum í einum vanligum MPV situr man høgt í bilinum við góðum útsýni, eisini at bakka við. Kia Carens 1,8 við bensinmotori kostar 220.800,- sum persónbilur.



## Kia Carens EX 2,0 CRDi

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur 4 syl. diesel 112 hk v. turbo og commonrail |
| innspræning | |
| 0-100 km/t | 13,5 sek |
| Oljunýtsla | 14,3 km/l |
| Dekkstødd | 205/60-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 449,3 cm |
| Breidd | 174,8 cm |
| Hædd | 160,9 cm |
| Eginvekt | 1450 kg |
| Totalvekt (persónbilur) | 1975 kg |
| Totalvekt (vørubilur) | 2025 kg |
| Viðførisrúm | 422 litrar |
| prísur | kr. 236.800,- (persónbilur v. |
| luksus pakka) | |
| | kr. 206.800,- (vørubilur |
| v.luksus pakka) | |
| | Metallakk + 3.000,- |
| Søluumboð | D.B. Bilar<br>J. Broncksgøta 15<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 310600 |








*Derek Brockie frá D.B. Bilum er her við Kia Sorento CRDi. Ein væl útgjørdur 4x4 sum kappast við teir dýru luksusjeeparnar.*

# Kia Sorento - kappast við teir dýru luksusjeeparnar

**Kappingin frá koreansku bilunum harðnar alla tíðina. Kia eru nú komnir á marknaðin við Sorento, einum 4x4 luksusbili, sum fer í beinleiðis kapping við bilar sum t.d. Mercedes ML og Jeep Cherokee**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Kia Sorento er ein heilt nýggur og spennandi bilur frá koreansku Kia bilverksmiðjuni. Av tí at bilurin í útsjónd og í aðrar mátar leggur seg tætt upp at bilum sum t.d. Mercedes ML og Jeep Cherokee, hava fleiri motorjournalistar royndarkoyrt hesar bilarnar saman við Sorento.

Bert á einum øki stendur Sorento ikki mát við kappingarneytarnar, og tað er upp á prísin, tí hann er bíligari, og næstan alt er standard. Kia Sorento fæst við hesum trimum motorunum: 2,4 litur 4 syl. bensin við 139 hk, 3,5 litur V6 bensin við 195 hk og 2,5 litur 4 syl.CRDi diesel við 140 hk. Hesin seinasti 2,5 CRDi við beinleiðis common rail innspræning er tann mest áhugaverdi motorurin til okkara brúk. Ein framkomin teldustýrd 4x4 skipan stýrir sjálv kraftini til framhjólini, tá tørvur er á tí. Á vanligum góðum vegi trekkjur bilurin á bakhjólunum. Á Sorento er næstan alt standard. Bilurin hevur t. d. alu-felgur, el-antennu, tokulyktir aftan og framman, el-síðuspegl við hita, hitatráðir í viskarunum, cruise-kontroll ið verður stýrt frá rattinum, heilautomatiskt klimaanlegg, el-síðurútar, ABS Bremsur við EBD. Airbag framman, í síðunum og gardinairbag. Sorento er góður at sita í, man situr høgt í bilinum og koyrieginleikarnir eru á høgum støði. Servostýringin blívur tyngri og meira føst so hvørt sum ferðin økist. Um nógv viðføri er í viðførisrúminum, hevur bilurin hæddarstilling, soleiðis at hann altíð flýtur beint. Tá men setur seg inn í ein Sorento, fær man kensluna av at vera komin inn í ein dýran luksusbil. Bilurin fæst við automatiskum girum, leðursetrum og førarasetur við el-stilling allar vegir. Derek Brockie frá D.B. Bilum sigur, at eftirspurningurin eftir Sorento er so stórur, at hann dagliga fær fyrispurningar frá útlandinum, har spurt verður, um hann hevur bilar til yvirs at lata teimum. Orsøkin er, at verksmiðjan klárar ikki at framleiða nokk av bilum til stóra eftirspurningin.



## Kia Sorento 2,5 CRDi

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,5 litur 4 syl. diesel 140 hk<br>v. common-rail innspræning |
| 0-100 km/t | 14,6 sek |
| Oljunýtsla | 11,8 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 225/75-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 456,7 cm |
| Breidd | 186,0 cm |
| Hædd | 172,4 cm |
| Eginvekt | 1950 kg |
| Totalvekt | 2600 kg |
| Viðførisrúm | 441 litrar |
| prísur | kr. 384.800,-<br>Automatgir + 15.000,- |
| Søluumboð | D.B. Bilar<br>J. Broncksgøta 15<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 310600 |